# Norðurlendskir blaðteknarar til Føroya

**Fokus verður sett á blaðtekningina sum listargrein og sum amboð í samfelagsliga orðaskiftinum alla hesa vikuna. Seks danskir, ein norskur, ein íslendskur og tveir føroyskir blaðteknarar eru við á framsýning í Norðurlandahúsinum leygardagin kl. 15. Pallborðsorðaskifti verður í Miðlahúsinum fríggjakvøldið**



*Donsku blaðteknararnir komu til Føroya við Atlantsflogi 2. páskakvøld og nýttu teir høvi at hoyra Martin Joensen Band spæla í Miðlahúsinum hetta kvøldið. Og tað var skjótt, at henda konsertin kom niður á tekniblokkin. Úrslitið síggja tit her. Teknarar Annette Carlsen og Claus Seidel.*

BLAÐTEKNINGAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Norðurlendskir blaðteknarar hava sett hvørjum øðrum stevnu í Føroyum í hesum døgum.

Talan er um at seta fokus á blaðtekningina sum listagrein og sum týðandi part av demokratiska orðaskiftinum í Norðurlondum. Tekningar hjá seks donskum, einum norskum, einum íslendskum og tveimum føroyskum blaðteknarum verða við á eini stórari framsýning, sum letur upp í Norðurlandahúsinum leygardagin 22. apríl. kl. 15.

Teknararnir fara alla vikuna at tekna frá ymsum plássum í landinum og verða hesar tekningar eisini við á framsýningini.

Hósdagin frá klokkan 14 til 17 verður verkstova í Miðlahúsinum, har høvi verður hjá almenninginum at hitta teknararnar og eisini síggja teir arbeiða.

Fríggjakvøldið 21. apríl klokkan 19 verður stórt pallborð í Miðlahúsinum, har evnið er: "Blaðtekning og fólkaræði" - týdningurin blaðtekningin hevur fyri almenna orðaskiftið í Norðurlondum. Í pallborðinum verða nakrir av útlendsku teknarunum og eisini umboð úr Føroyum. Sjálv framsýningin letur upp í Norðurlandahúsinum leygardagin klokkan 15 og fer at standa uppi í tríggjar vikur. Seinni verður hon so eisini víst í Norðurlandahúsinum í Reykjavík og á Bryggjuni í Keypmannhavn.

Tað er Miðlahúsið í Vágsbotni, sum hevur tikið stig til framsýningina, sum er tann fyrsta av sínum slag í Norðurlondum. Ein av orsøkunum til at skipa fyri framsýningini er at hátíðarhalda 70 ára føðingardagin hjá føroyska teknaranum Óla P. Við á framsýningini verða nakrar hundrað tekningar.

Stuðlað verkætlanini hava m.a. Nordisk Kulturfond, Dansk Færøsk Kulturfond, Politikkens Fond, BP, og Atlantic Airways hevur syrgt fyri at fáa allar blaðteknararnar væl og trygt til Føroya og heimaftur við sínum flogførum.



